# Eg hómi ein sang mær í hjarta

*Lag:Uppruni o*kkum ókendur

E H7 E A H7 E
1.Eg hómi ein sang mær í hjarta, ið gevur mær hvíld og frið.
E7 F#m H7 E A H7 E
Hann hoyrist í náttmyrkri svarta, í eydnu og sorgini við.
*Niðurlag:*
E H H7 E A E H7 E
Tí røddin er Jesus, tónin er Jesus. Jesus aleina og als einki meir.

2.Og tónin, sum býr mær í hjarta, mær lættir um lívsins leið.
Í sól og í náttmyrkri svarta, meg varir hvørt spor, ið eg steig.

3.Tá skýlið á foldum man fara, og heimferðin endað er,
skal tónin í hjartanum vara, hjá einglum í himmalsku verð.

OBS: *Lagið nakað broytt.*
E H7 E F#7 H7
4.Ein undursom rødd, eitt undursamt lag, meg gleða, um verðin var vánd.
E F# F#7 H7 E
Eg veit, eg tann sang skal syngja ein dag, á heimlandsins friðsælu strond.

*Sverre Nielsen*

*P.J. Sigvardsen týddi á vári 2024*